

Regin Vágadal ovast á sigurspallinum í Gundadali




Janne Virtannen er heimsins sterkasti, men hann kláraði ikki at taka Regin Vágadal á ólavsøku.

# Regin basti heimsins sterkasta

**Føroya sterkasti maður, Regin Vágadal, vann tvídystin við heimsins sterkasta mann, Janne Virtannen, og so kundi Regin annað árið á rað krýnast sum Atlantsrisi**

STERKIR MENN
*Eyðun Klakstein*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Regin Vágadal er framvegis Atlantsrisi.

Føroya sterkasti maður vardi á ólavsøku heitið sum Atlantic Giant í kappingini millum sterkar menn úr fleiri londum.

Heimsins sterkasti maður, Janne Virtanen úr Finlandi, var drúgvur í kappingini, men Regin Vágadal helt seg frammanfyri Janne, og harvið var heimsins sterkasti maður bastur á leiðni móti sigrinum.

Kappingin var annars merkt av skæðum, tí tríggir av teimum átta luttakarunum máttu fara úr kappingini.

Danin René Minkwitz, sum Regin hevur kappast saman við, tá talan hevur verið um liðkappingar, kom ongantíð í gongd, tí hann fekk ilt fyri hjartað og varð fráráddur at fara at lyfta.

Hugo Girard úr Kanada var við í fyrstu tveimum kappingunum, men noyddist síðani at gevast, tí hann kendi seg illa.

Mest álvarslig var tó støðan hjá litavanum Zydrunas Zaviskas, sum fekk álvarsligan løst í bæði knøini, meðan hann var í holt við eina av teimum sjey kappingunum.

## Vát byrjan

Kappingin byrjaði í Vágsbotni leygarmorgunin. Veðrið var ikki til vildar, tí tað regnaði illa, tá teir sterku menninir royndu seg í »Log lift« og Dead lift«.

Fyrstu kappingina vunnu Zaviskas og Girard, sum báðir stóðu seg eins væl. Eftir tvær tær fyrstu kappingarnar var tað tó óhepni litavin, Zaviskas, sum var á odda, tí hann vann næstu kappingina.

Eftir hesar báðar kappingarnar stóð Regin Vágadag á jøvnum við Hugo Girard, meðan heimsins sterkasti, Janne Virtannen, hevði fingið ringa byrjan og lá á fimta plássi.

Seinni partur av kappingin var á ovara vølli í Gundadali leygarkvøldið, og tá royndist veðrið munandi betri, og tað var eingin trupulleiki at halda kappingina.

Regin Vágadal legði bragdliga fyri á ovara vølli, tí hann vann fyrstu kappingina, sum var at lyfta nakrar tungar steinar so skjótt sum gjørligt.

Við sigrinum í triðju kappingini tók Regin Vágadal fremsta plássið í kappingini. Oddafiskurin frammanundan, Zaviskas, endaði aftast í hesi kapping.

## Regin onga vánaliga kapping

Undan fjórðu kapping vóru tað serliga Regin Vágadal og Zaviskas, sum gjørdu vart við seg, men tað var júst í hesi kapping, at Zaviskas fekk álvarsliga skaðan og mátti flytast á Landssjúkrahúsið, har hann varð skurðviðgjørdur.

Regin Vágadal vann hesa kappingina, sum kallast »Millwalk«, og tað var eftir hesa kappingina, at tvídysturin við heimsins sterkasta mann rættiliga byrjaði. Virtannen var nummar tvey, og hann elti Regin Vágadal restina av kappingini.

Tríggjar tær seinastu kappingarnar helt Regin Vágadal sær allatíðina millum teir fremstu, og tað gjørdi, at hann varð ikki tikin.

Regin vann tríggjar av teimum sjey kappingunum, men lykilin til at vinna slíka kapping samanlagt er at vera frammaliga í øllum kappingunum.

Tað var júst tað, sum var munurin millum Regin Vágadal og Janne Virtannen, sum fekk vánaliga byrjan í kappingini, og tí ikki kláraði at taka Vágadal.

Eftir sjeyndu kappingina, sum var ein tættur tvídystur millum Regin og Virtannen, kundi Føroya sterkasti krýnast sum Atlantsrisi annað árið á rað.



Óhepni litavin, Zaviskas, var á odda tíðliga í kappingini



Regin Vágadal og Janne Virtannen kappast í seinasta umfarinum. Teir vóru sera javnir í hesi kapping.



*Gunnar Dahl Olsen vann ársins +konto súkklukapping. Esmar Joensen var nummar 2 og Sverri Mohr Edvinsson nummar 3*



# Bogi vann seinasta umfar

**Gunnar Dahl-Olsen var tó greiður vinnari í samanløgdu kappingini**

SÚKKLING
*Eyðun Klakstein*

Seinasta umfar í +konto súkklukappingini var á ólavsøku, og hóast Bogi Kristiansen vann hesa kappingina, so var Gunnar Dahl-Olsen greiður vinnari í samanløgdu støðuna.

Seinastu árini hevur tað verið afturvendandi táttur á summarstevnunum, at føroysku súkklararnir hava kappast í eini Grand Prix kapping, har tann, sum stendur seg best í teimum seks kappingunum, vinnur.

Í ár hevur Gunnar Dahl-Olsen skarað framúr í hesi kappingini, men hann fekk harða kapping í seinasta umfarinum, sum var fríggjakvøldið.

Bogi Kristiansen, sum vann Statoil kring Føroyar, var við í kappingini, og somuleiðis vóru tríggir danskir súkklarar.

Eingin av hesum kundi tó gera seg galdandi í samanløgdu kappingini, tí her var Gunnar Dahl-Olsen greitt á odda, meðan Esmar Joensen.



*Bogi Kristiansen vann seinasta umfar í +konto súkklukappingini. Gunnar Dahl Olsen varð nr. 2 og Ken Holmquist Olsen nr. 3*

## Bogi stakk av

Í seinasta umfari varð súkklað í 50 minuttir og eitt umfar, og kappingin gekk fyri seg í Havnini.

Jóhann Brend legði harðliga fyri, og hann var á odda í nøkur umfør, áðrenn hann varð tikin av millum annað av Boga Kristiansen og Gunnari Dahl-Olsen.

Móti endanum av kappingini stakk Bogi Kristiansen av frá hinum, og tað eydnaðist honum at rýma.

Hann kom einsamallur á mál, og tryggjaði sær harvið sigurin í seinasta umfarinum av +konto kappingini.

Gunnar Dahl-Olsen, Ken Holmquist Olsen og Jóhann Brend komu síðani á mál, meðan Esmar Joensen kom í næsta bólkinum.

Kappingin endaði við, at Gunnar vann við 154 stigum, meðan Esmar Joensen var nummar tvey við 116 stigum. Sverri Mohr Edvinsson var nummar trý við 110 stigum.

# VÍF og Neistin vunnu

Tveir hondbóltsdystir vórðu spældir á ólavsøku, og teir endaðu við, at VÍF og Neistin vunnu.

VÍF spældi klassiska dystin ímóti Kyndli, og tað vóru føroyameistararnir úr Vestmanna, sum vunnu hendan dystin. Úrslitið var 26-18.

Toppskjútti hjá vestmenningum var Sámal Joensen, sum gjørdi skes mál. Útisetin, Tróndur Joensen, sum var aftur á Kyndlaliðnum á ólavsøku, var toppskjútti hjá Kyndli. Tróndur gjørdi sjey av teimum 18 málunum hjá Kyndli.

Hin dysturin var millum Neistan og StíF, og her vunnu neistamenn við sjey málum.

Í hálvleikinum var bert eitt mál á muni millum liðini, men seinna hálva tíman økti Neistin um munin.

Úrslitið var 30-23 til Neistan, og her var Heni Joensen toppskjútti við 9 málum. Leivur Justinussen skoraði sjey mál fyri strandingar.

**ek**

# Stjørnan fær nýggjan málverja

**Litaviskur ungdómslandsliðsspælari skal verða málverji hjá Stjørnuni í vetur**

Í vikuni kom nýggjur hondbóltsspælari til Klaksvíkar. Talan er um ein ungan málverja, sum spælir við litaviska U21 landsliðnum.

Samstarvið millum Stjørnuna og málverjan, sum eitur Agnes, er komið í lag umvegis hin litaviska spælaran hjá Stjørnuni. Simonu Dziugyte var toppskjútti hjá Stjørnuni í farna kappingarári, og hon kemur aftur til Klaksvíkar at spæla í vetur.

Hon hevur fingið hendur á málverjanum, sum er liðfelagið hjá Simonu á U21 landsliðnum hjá Litava. Tær vóru fyri kortum til eina kapping í Hvítaruslandi.

Rannvá Andreasen var í vetur fyrsti málverji hjá Stjørnuni, og hon verður eftir ætlan eisini við í vetur. Men Stjørnan ynskir at styrkja hetta plássið, so felagið hevur tveir góðar málmenn, verður sagt úr Klaksvík.

**ek**